

*- Ein lítil kommuna, sum Nólsoyar kommuna, fer neyvan at hava neyðugu umsitingarligu orkuna at nøkta tær nýggju avbjóðingarnar, ið liggja fyri framman, heldur bygdarráðið*

# Avgerðin fær stóra ávirkan á menningina av Nólsoyarbygd

**Nólsoyingar vilja hava nýggjan barnagarð, skúlin og fimleikarhøllin skulu útbyggjast, ynski er um framskundaða útstykking og at gera svimjihylin lidnan - og tey eldru hava tørv á virðiligari umstøðum. Hetta eru nakrar av orsøkunum til, at bygdarráðið mælir til samanlegging**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var á bygdarráðsfundi, 26. november 2003, at Nólsoyar bygdarráð einmælt samtykti at taka upp samráðingar við Tórshavnar kommunu um samanlegging.

Eftir hesa avgerð, hevur nógv fundarvirksemi verið millum umboð fyri Nólsoyar kommunu og Tórshavnar kommunu, og úrslitið er, at eitt uppskot til sáttmála við fylgiskjali nú fyriliggur. Bygdarráðið hevur viðgjørt sáttmálan og fylgiskjalið og hevur einmælt samtykt at taka undir við hesum.

Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar kommunu hevur eisini viðgjørt málið og tekur undir við uppskotinum til samanlegging.

Í Nólsoy verður borgarafundur í Royndarhúsinum, 13. mars kl. 16, har bygdarráðið fer at kunna um tilgongdina, og fólk fáa høvi at seta spurnnigar og gera viðmerkingar. Við á fundinum verður eisini býráðsformaðurin í Havn, Jan Christiansen. 20. mars verður so vegleiðandi fólkaatkvøða í Nólsoy um samanlegging. Atkvøtt verður í Royndarhúsinum frá klokkan 10-20.

Úrslitið av vegleiðandi fólkaatkvøðuni verður lagt fyri bygdarráðið til endaliga støðutakan. Samtykkir bygdarráðið sáttmálan, verður ásettur ein dagur, nær hesin verður undirskrivaður.

### Men hví?

Í kunningarskrivi til bygdarfólkið, greiðir bygdarráðið frá, hví tey fóru at arbeiða við samanlegging.

- Sum øllum kunnugt, hava bæði lands- og kommunalpolitikkarar í áravís arbeitt miðvíst fram ímóti einum nýggjum uppbýti av lands- og kommunuuppgávum. Høvuðsendamálið hevur verið at fáa eitt greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Kommunurnar skulu átaka sær størri part av teimum uppgávum, sum hava beinleiðis ávirkan á borgaran, eitt nú barnaansing, barnaforsorg, adressuumsiting, kommunala partinum av landsins tilbúgvingarætlan, undirvísing av fólkaskúla-børnum og eldraøkinum. Aftrat hesum koma onnur lógarkrøv, eitt nú á umhvørvisøkinum, krøv til góðsku á drekkivatni og handfaring av spillvatni (kloakkir).

Víst verður á, at landsmyndugleikarnir eisini hava sett kommununum strong krøv til umsiting, eitt nú krøv til skjalaskrá, roknskaparhald og freistir, eins og krøv til íløgu- og lánikarmar.

- Hetta rakar tær smærru kommunurnar serliga meint, sigur bygdarráðið.

Lagt verður aftrat, at øll hesi lógargivnu krøv saman við ynskjunum hjá borgarunum um eitt nøktandi kommunalt tænastustøði, fær bygdarráðið at halda, at munandi lættari verður at røkka málunum, um uppgávurnar verða lyftar í felag í eini størri kommunalari eind.

- Ein lítil kommuna, sum Nólsoyar kommuna, fer neyvan at hava neyðuga umsitingarliga orku til at nøkta tær nýggju avbjóðingarnar, soleiðis at skattakrónurnar verða gagnnýttar á besta hátt til frama fyri borgararnar í kommununi.

### Mong ynskir

Nólsoyar bygdarráð sigur, at tey í hesi valsetuni hava merkt, hvønn veg rákið ber.

- Á barnaansingarøkinum er ynski um íløgur í nýggjan barnagarð, skúlin og fimleikarhøllin skulu útbyggjast, ynski er um at fáa framskundaða útstykking, ynski er um at gera svimjihylin lidnan og tey eldru hava tørv á virðiligari umstøðum.

Hesar orsøkir eru viðvirkandi til, at Nólsoyar bygdarráð nú mælir til, at kommunan verður løgd saman við Tórshavnar kommunu.

- Borgarar í Nólsoyar kommunu hava í mong ár brúkt tænastur hjá Tórshavnar kommunu, har vit hava fingið stóra vælvild. Tað er tí náttúrligt, at vit nú verða ein sameindur partur av Tórshavnar kommunu og gerast borgarar við somu skyldum og somu rættindum, heldur Nólsoyar bygdarráð.

### Aðaltankin aftan fyri samanleggingina er:

- at gera kommunurnar betur førar fyri at veita borgarunum betri tænastur í einum nútíðarsamfelag
- við samskipan at effektivisera og rationalisera planleggingina og raksturin av kommununum
- at fáa størri nyttu úr íløgum, ið longu eru gjørdar ella eru í gerð og harvið forða fyri skeivum "dupultum" íløgum
- kommunurnar standa sterkari í kapping við útlandið um arbeiðspláss, og
- at allir borgarar, hvar teir so enn búgva í sameindu kommununi, skulu hava somu skyldur og somu rættindi.

Dentur skal leggjast á, at tænastuveitingar og kostnaðarstøðið verður tað sama hjá øllum borgarum í kommununi.

Sáttmálin:

# Nýggjur barnagarður fyri 8 miljónir krónur

**Íløgur skulu í hesum árinum gerast í útstykking, bátadrátt og fótbóltsvøll fyri tilsamans eina miljón krónur, sum skal fíggjast við lántøku**

BARNAGARÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í uppskotinum til sáttmála millum Nólsoyar kommunu og Tórshavnar kommunu stendur, at í næstu setu (2005-2009) bindir samanlagda kommunan seg til at gera íløgu í nýggjan barnagarð í Nólsoy, har ætlandi verður pláss fyri umleið 30 børnum. Í barnagarðinum verður eisini rúm fyri vøggustovu og frítíðarskúla. Hóskiligt øki er útvegað til endamálið, sum er 2500 fermetrar til víddar. Mett verður, at kostnaðurin av bygginigini verður einar 8 miljónir krónur.

Avtalað er eisini í uppskotinum til sáttmála, at tey kommunalu arbeiðini, sum eru í gongd í Nólsoy innan 1. januar 2005, skulu fullførast.

Haraftrat skulu í hesum árinum gerast íløgur fyri eina miljón krónur, sum skal fíggjast við lántøku. Talan er her um íløgur til útstykkingar (500.000-600.000 krónur), bátadrátt (200.000-300.000) og fótbóltsvøll/ítróttarvøll á Mýruni (200.000 krónur).



# Umhugsar støðuna í Sambandsflokkinum

**Frákoyrdi landsstýrismaður Sambandsfloksins umhugsar støður sína í flokkinum, men hann stuðlar samgonguni av fullum huga. Hann hevur tikið avgerð løgmans til eftirtektar – og vónar at verða drigin í rættin, so hann kann reinsast fyri ákærurnar móti sær seinastu dagarnar, ið hann heldur vera órættvísar**

FRÁKOYRDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Eg fari nú at finna út, hvør er fyri mær og hvør ið er í móti mær í Sambandsflokkinum, síðani taki eg støðu til, hvussu míni viðurskifti verða við Sambandsflokkin framyvir. Men eg stuðli framvegis samgonguni 100%

Soleiðis segði Johan Dahl, beint eftir at løgmaður hevði koyrt hann frá sum landsstýrismann. Honum untist 20 dagar sum landsstýrismaður, og tað er tað stytsta, nakar hevur sitið sum landsstýrismaður.

– Eg havi staðfest, at flokkurin ikki stendur samdur aftan fyri meg, tí bæði Listbeth L. Petersen og Alfred Olsen hava hava verið ímóti mær, tí má eg umhugsa støðu mína í flokkinum. Men eg veit, at veljarar mínir í Suðuroy standa aftan fyri meg, sigur Johan Dahl.

Frákoyrdi landsstýrismaðurin heldur tað vera sera óheppið, at tað eru fjølmiðlarnir, sum seta dagsskránna.

– Tað sum fyrigongur í fjølmiðlunum í dag er ein konsekvent jagstran eftir sensasjón fyri at fella ein landsstýrismann. Tað er ikki ein spurningur, um tað er Johan Dahl ella Jóannes Eidesgaard ella ein triði ella fjórði, hetta hava vit sæð nú í nøkur.

– Hetta er ein ódámlig gongd, tí eg trúgvi ikki, at Jóannes Eidesgaard fær meiri frið í samgonuni, fyri tað um Johan Dahl ikki situr har. Vit kunnu bara bíða eftir, hvør verður tann næsti, sum kemur í vrýggimaskinuna hjá fjølmiðlunum.

– Men eg vóni, at hann fær arbeiðsfrið í samgonguni við hesi avgerðini, sigur hann.

Johan Dahl sigur, at hann valdi tilvitað ikki at fara sjálvur, tí hann heldur tað ikki vera rættvíst.

Men Johan Dahl hevur eingi »hard fellings« mótvegis Jóannes Eidesgaard, løgmanni.

– Hann má sjálvandi taka síni fyrilit, og tað hevur hann gjørt, men hetta vísir bara, at tað er sera trupult hjá vinnulívsfólki at koma í landsstýrið. Tað tykist, sum um pláss bara verður fyri lærarum, pedagogum ella øðrum, ið eitt nú ikki hava verið virkin í vinnulívinum, tí hevur tú tað, so hevur tú eisini gjørt okkurt mistak, heldur Johan Dahl.

Hóast hesar tríggjar vikurnar hava verið truplar hjá Johan Dahl, so er hann enn tann sami.

– Persónliga taki eg hetta ikki so tungt, eg eri púra avkláraður við støðuna og eri tann sami, sum eg var fyri 3. februar. Vit hava eisini tosað um hetta í familjuni, sum eisini er avklárað við støðuna, sigur Johan Dahl.

Men fer Johan Dahl víðari við hesum málinum? Er tað hugsandi, at hann fer at melda nakran fyri at hava ærumeitt seg?

– Tað fari eg neyvan. Mær dámar ikki at ganga runt og svína fólk til, og eg tími rætt og slætt ikki at hugsa um slíkt. Men eg vóni, at Inge Krause Jensen fer í rættin við hesum málinum, so eg kann blíva reinsaður fyri hesar ákærurnar, sigur Johan Dahl.



*– Mær dámar ikki at ganga runt og svína fólk til, sigur Johan Dahl, sum ikki tímir at gera meira við málið og tær ákærur, ið feldu hann. Men hann vónar, at Inge Krause Jensen fer í rættin við málinum, so hann kann verða reinsaður*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Onga leiðslu síðani Edmund

**– Sambandsflokkurin hevur onga leiðslu í løtuni, og hevur onga veruliga leiðslu havt síðani Edmund Joensen, sigur Johan Dahl, sum mælir til at Jaspur Vang verður nýggjur landsstýrismaður**

FRÁKOYRDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Sambandsflokkurin hevur onga leiðslu í løtuni, og tað hevur hann ikki havt síðani Edmund Joensen varð frákoyrdur. Men eg vóni sannliga, at flokkurin verður endurreistur skjótast.

Hetta sigur Johan Dahl, júst frákoyrdi landsstýrismaðurin, sum í løtuni umhugsar støðu sína í Sambandsflokkinum.

Hann finst harðliga at formanninum, Alfred Olsen og fyrrverandi formanninum, Lisbeth L. Petersen, sum hann heldur bæði beinleiðis hava mótarbeitt sær.

Enn er ikki greitt, hvør verður nýggjur landsstýrismaður hjá Sambandsflokkinum. Men Johan Dahl skjýtur upp, at næsti maður á listanum hjá Sambandsflokkinum í Suðuroy, Jaspur Vang, sum hevur havt sæti fyri hann í tinginum seinastu tríggjar vikurnar, verður nýggjur landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Tá flokkurin valdi Johan Dahl til landsstýrismann, fekk hann stuðul frá Edmund Joensen, Marjus Dam, Bárði Nielsen umframt sína egnu atkvøðu. Alfred Olsen, Listbeth L. Petersen og Kaj Leo Johannesen stuðlaðu honum ikki.

Heðin Mortensen, sum ikki varð afturvaldur á valinum 21. januar, gjørdi beinanvegin greitt, at hann ikki helt valið av landsstýrismonnum verða tað rætta. Hann heldur, at Suðurstreymoy við 19.000 atkvøðum, eigur at verða umboðað í landsstýrinum.

Heðin Mortensen hevur fingið skotið í skógvarnar, at hetta er fyri at hann sjálvur skal fáa sæti á tingi, um Kaj Leo Johannesen fór í landsstýrið. Hann sigur tó við Sosialin, at hann ikki á nakran hátt fer at blanda seg í telvingina hjá tingmanning Sambandsfloksins.

– Tey tóku støðuna tá, og tey eiga aftur at taka støðu nú. Eg vóni so bara, at tey taka ta røttu støðuna. Eg havi sagt mína meining, og fari ikki at siga meira. Eg hava planlagt mín gerandisdag eftir støðuni, og soleiðis verður tað, sigur Heðin Mortensen, sum avvísir, at hann skal vera upp á tal sum nýggjur landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

# Floksformenninir ósamdir

**Meirilutin av floksformonnunum tykjast stuðla løgmanni í avgerðini at loysa Johan Dahl úr starvi sum landsstýrismaður í Fiskivinnumálum, meðan aðrir vísa á dómin um Anfinn Kallsberg sum orsøkina til uppsøgnina av Johan Dahl**

FLOKSFORMENN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

### Høgni Hoydal, Tjóðveldisflokkurin:

Eg fari ikki at siga, um Jóannes Ejdesgaard í morgun hevur tikið eina skeiva ella rætta avgerð, men Tjóðveldisflokkurin hevur gingið undan í, at álit skal vera á politisku skipanini, bæði tá tað kemur til embætisførslu, og tá arbeiðsfriður og álit skal fáast í lag.

Hvørjaferð slíkar avgerðir verða tiknar, verða nøkur mørk sett, og ynskiligt hevði verið, um allir flokkarnir vóru samdir um hesi mørk. Eg haldi fólk vita, hvat Tjóðveldisflokkurin hevði gjørt í hesum máli, tí tað eru fleiri dømi um, at júst Tjóðveldisflokkurin hevur tikið avleiðingarnar av embætisførslu og vantandi áliti á ein ein landsstýrismann.

### Jenis av Rana, Miðflokkurin:

Hetta er ein grøv, sum teir við diskvalifikatiónini av Anfinn Kallsberg sjálvir hava gravað, og um støðið nú er sett, noyðist løgmaður at halda fram, tí tað eru aðrir núverandi landsstýrismenn, sum eisini eiga at rúka, um Johan Dahl ikki er skikkaður.

Talan er um eina logiska fylgju av dóminum um Anfinn Kallsberg, og nú eiga fleiri uppsøgnir at vera á veg í Tinganesi. Til málið sjálvt um Johan Dahl haldi eg ikki, at teir hava givið sær stundir at kanna tað. Um hetta skal vera støðið, fer framtíðin at krevja fleiri til dóms, og fólk kunnu gita sær til, hvønn sipað verður til. Nú má løgmaður halda fram.

### Jørgen Niclasen:

Fyrst og fremst vil eg siga, at Fólkaflokkurin ongantíð hevur viðgjørt málið og hevur tí ikki grundarlag at døma um avgerð løgmans í dag, men tá Sambands- og Javnaðarflokkurin frá byrjan noktaðu Anfinn Kallsberg landsstýrissess og samstundis settu Johan Dahl, byrjaði tað heila at gerast mótsigandi og óskiljandi.

Vit ávaraðu hesum beinanvegin, tí vit vistu sjálvsagt, at ófriður fór at standast av Johan Dahl, men maðurin varð settur, og nú er hann loystur úr starvi. Fleiri viðmerkingar hava vit ikki til málið.

### Kristian Magnussen, Javnaðarflokkurin:

Eg meti, at løgmaður í morgun tók eina rætta avgerð við somu grundgevingum, sum Jóannes Ejdesgaard hevur nýtt. Arbeiðsfriður mátti fáast, tí alt hevur ligið lamið, og tískil var hetta neyðugt.

Tó hevði verið ynskiligt, um Sambandsflokkurin ella Johan Dahl sjálvur tóku hetta stigið, áðrenn tað kom so langt, at løgmaður mátti grípa inn.

### Kári P. Højgaard, Sjálvstýrisflokkurin:

Eg haldi ikki, at løgmaður hevði nakrar aðrar valmøguleikar enn at koyra Johan Dahl, tí tað var nú vorðið ein so stórur og konsentreraður trupulleiki og meinbogi fyri arbeiðslagið í samgonguni, og tískil haldi eg, at Jóannes Ejdesgaard tók eina neyðuga avgerð í morgun.

Tað er lætt at vera bakklókur, men tá ein turbulentur vinnulívsmaður verður settur, kann man alíð rokna við slíkum, og tað hava jú verið ávarandi røddir frammi um hetta frá byrjan. Men við grundgeving løgmans um eina politiska avgerð meti eg tað vera rætt at siga Johan Dahl úr starvi.